Annfinn V. Hansen:

– Skipanin virkar

– Skipanin riggar fínt. Hetta er stórtsæð sama støða sum í Danmark fyri fýra árum síðani, sigur Annfinn V. Hansen, sum var við til at gera Stýrisskipanarlógina

STÝRISSKIPAN
Heri á Rógvi

Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya hevur fingið nógva umrøðu seinastu tíðina. Tað er hendan lóg, ið Føroya Løgting hevur samtykt, sum gevur Føroya løgmanni, Anfinni Kallsberg, heimild til at halda fram sum løgmaður við sekstan tingmonnum í sínum parti. Støðan er tann, at hann ikki hevur ein meiriluta ímóti sær, og kann hann tí halda fram.

Anfinn V. Hansen, advokatur, var ein teirra, ið var við til at gera Stýrisskipanarlógina. Hann heldur, at skipanin virkar væl.

– Initiativið liggur hjá løgmanni. Er eingin meiriluti ímóti honum, so eigur hann rættin til at halda fram sum løgmaður, staðfestir Annfinn V. Hansen.

Anfinn V. Hansen greiðir frá, at hetta er meinlík skipan, ið vit kenna úr Norðanlondum og nógvum londum í Evropa. Talan er um parlamentariska skipan, har sitandi løgmaður kemur í eina lyklastøðu, og hann hevur møguleika at halda fram. Einasta treytin er, at hann ikki hevur ein meiriluta ímóti sær, t.e. minst seytjan tinglimir.

– Løgmanssessurin er avgerandi. Valdið liggur hjá løgmanni, sigur Annfinn V. Hansen.

– Við teirri gomlu skipanini, so skuldi tað absolut vera ein meiriluti, og tann seytjandi maðurin varð avgerandi, sigur Annfinn V. Hansen.

Danir komu í eina líknandi støðu fyri góðum fýra árum síðani, veit Annfinn V. Hansen at siga. Annars eru tað lítil sannlíkindi fyri, at ein tílík støða kemur fyri, sigur Annfinn.

– Veljarin fær framvegis tær tinglimir, ið hann ynskir, sigur Annfinn V. Hansen, sum ikki heilt veit at siga, hvørt tað er rætt ella skeivt, at flokkarnir ikki hava lagt dentin á, at sitandi samgongu kann halda fram í valstríðnum.

Løgmanssessurin er avgerandi. Valdið liggur hjá løgmanni, sigur Annfinn V. Hansen, sum var við til at gera Stýrisskipanarlógina í sínari tíð

Tingformaðurin avgerandi

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, hevur boðað frá, at hann heldur fram, til hann fær ein meiriluta ímóti sær. Leggur hann sessin frá sær, so verður tað talan um eitt sokallað tingformansumfar, har umboð fyri allar flokkar á tingi skulu velja nýggjan samgonguleiðara.

Her kann løgtingsformaðurin koma í lyklastøðu. Løgtingsformaðurin hevur ávísar heimildir í sambandi við skipanina av arbeiðinum í tinginum, og hann kann eisini fáa avgerandi orðið í spurninginum um samgonguleiðara.

Stendur á jøvnum millum tveir í einum tílíkum formansumfari, so er tað tingformaðurin, ið ger av, hvør samgonguleiðarin verður, sigur Annfinn V. Hansen.

Anfinn Kallsberg:

– Sjálvstýrið er parkerað

– Við verandi støðu, so kunnu vit ikki halda fram við verandi sjálvstýristilgongd. Sjálvstýri Føroya fólks er parkerað, og tað verður ómøguligt at fremja niðurskurðir í blokkinum sum støðan er nú, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður

POLITIKKUR
Heri á Rógvi

Tórshavn: Anfinn Kallsberg hevur avgjørt at halda fram sum løgmaður við sekstan tinglimum í sínum parti.

Hann ætlar sær at halda fram, til hann fær ein meiriluta ímóti sær.

Tað er soleiðis at verandi samgonguflokkar, Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin halda fram við sínum sekstan tingmonnum. Tað vil so siga, at tað stendur á jøvnum millum samgonguna og andstøðuna, og talan er ikki um nakran meiriluta í samgonguni, men talan er heldur ikki um nakran minniluta - tað stendur púra á jøvnum.

Løgmaður stendur fast við, at hann fer ongan veg úr sessinum um ikki so er, at hann fær ein meiriluta ímóti sær.

Tískil kunnu tvær støður ávirka støðuna sum er:

Ein andstøðulimur fer úr andstøðuni í samgonguna, og samgongan fær parlamentariskan meirilutan.

Hin møguleikin er, at ein limur í samgonguni fer úr samgonguni, og talan verður sostatt um ein støða, har løgmaður sigur seg vilja fara til løgtingsformannin og biðja hann um at loysa seg úr starvi.

Trong støða

Anfinn Kallsberg ásannar, at hann er komin í eina tronga støðu í tinginum, og hetta var als ikki ein støða, ið hann hevði ynskt sær.

– Eg havi roynt og eg royni framvegis at fáa eitt breitt parlamentariskt grundarlag, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at hann hevði tveir møguleikar: at halda fram sum løgmaður við sínum sekstan tingmonnum, ella hann kann velja at biðja um eina formansrundu og harvið siga seg úr sessinum sum løgmaður.

– Tá eg ikki havi nakran meiriluta ímóti mær, so havi eg valt at halda fram, men í tí løtu, at eg havi ein meiriluta ímóti mær, so fari eg til løgtingsformannin, sigur Anfinn Kallsberg.

Sum støðan er nú, skal Anfinn hava stuðul úr andstøðuni fyri at fáa uppskot samtykt í Løgtinginum. Hetta fær tó ikki at fara til tingformannin, og biðja hann taka ein tingformansrundu.

Hann valdi at royna Javnaðarflokkin afturat sitandi samgongu, men hann avvísir ikki, at hann vil royna aðrar flokkar. Innbjóðingin til Javnaðarflokkin stendur eisini við. Løgmaður helt, at Javnaðarflokkurin passaði best inn í myndina – serliga í sjálvstýrisspurninginum. Løgmaður vildi helst hava breiða samgongu, og valdi tí ikki at biðja Jenis av Rana koma til realitetssamráðingar og Sambandsflokkurin kann ikki vera í samgongu við Tjóðveldisflokkinum.

– Í prinsippinum fært tú nógv meira demokrati við hesari støðuni við 16-16, sigur Anfinn Kallsberg.

– Tað mesta av hesum sum hendir millum flokkarnar er taktiskt spæl, og soleiðis eigur tað eisini at vera, sigur Anfinn Kallsberg.

Andstøðan hevur tosað um, at teir ynskja at fáa eitt slætt borð, men løgmaður kann ikki heilt taka undir við hesum tosinum.

– Slætt borð hevur tú ikki, tá tú hevur ein løgmann, sum hevur eitt mandat til at skipa samgongu, sigur Anfinn Kallsberg.

Spurdir, um hann ikki er meira ein fólkafloksløgmaður enn Føroya fólks løgmaður, svarar hann, at hann hevur ikki fingið mandatið frá Fólkaflokkinum, men frá samgonguni.

Trupult við sjálvstýri

Verandi samgonga hevur serliga lagt dentin á sjálvstýris/fullveldis politikk. Á hesum økinum verður tað ógvuliga torført at fáa nakað á skafti við verandi blokkum í Løgtinginum.

– Við verandi støðu, so kunnu vit ikki halda fram við verandi sjálvstýristilgongd. Sjálvstýri Føroya fólks er parkerað, og tað verður ómøguligt at fremja niðurskurðir í blokkinum sum støðan er nú, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður vísir á, at Sjálvstýri Føroya fólks er eitt uppskot til samtyktar í løgtinginum, og tað er eydsæð, at tað verður trupult at fylja hesum í verandi støðu. Hvør yvirtøka og hvør niðurskurður í blokkinum skal samtykjast av Løgtinginum, og hetta heldur løgmaður verður ómøguligt við verandi andstøðublokki ímóti sær og sitandi samgongu.

— Tað kann enn nógv henda. Eg ynski stabil forhold fyri Føroyar, men eg dugi at síggja, at tað kann fara at gerast trupult, sigur Anfinn Kallsberg, sum sær út til at kunna kalla seg fyri Føroya løgmann eina tíð enn.

Landsstýrið

Núverandi landsstýrið heldur fram sum støðan er nú. Tað verður ein semja innanhýsis í samgonguni, ið ger av, hvussu landsstýrið skal skipast. Løgtingið hevur ikki ávirkan á hetta, men tingið velur løgtingsformannin.

Hann vil einki siga um, hvussu landsstýrið fer at vera mannað ella skipa í framtíðini.

— Einki er avgjørt viðvíkjandi landsstýrismonnum, men eg haldi ikki, at tað er rímiligt, at Sjálvstýrisflokkurin heldur fram við einum løgtingsmanni og tveimum landsstýrismonnum, sigur Anfinn Kallsberg.

Enn er ógreitt, nær støðan verður tikin til spurningin um landsstýrismenninar.



– Við verandi støðu, so kunnu vit ikki halda fram við verandi sjálvstýristilgongd. Sjálvstýri Føroya fólks er parkerað, og tað verður ómøguligt at fremja niðurskurðir í blokkinum sum støðan er nú, sigur Anfinn Kallsberg

Á veg burtur frá demokratinum

Tað, sum nú hendir á politiska økinum, leiðir okkum burtur frá demokratinum, sigur Atli Dam, fyrrverandi løgmaður, í viðmerking til politisku støðuna í Føroyum í dag

STÝRISSKIPAN
Edvard Joensen

– Andin í tí, sum nú hendir, førkar okkum burtur frá demokratinum á sama hátt, sum vit hava sæð í samband við ta tilgongd, sum roynt hevur verið at ført ígjøgnum undir hesi samgonguni, sum sitið hevur.

Soleiðis metir fyrrverandi løgmaðurin, Atli Dam, støðuna í føroyskum politikki í dag, nú Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur boðað frá, at hann ætlar at verða sitandi, til hann fær ein meiriluta í Løgtinginum í móti sær.

Atli Dam sigur, at formelt hevur løgmaður rætt til at gera tað, sum hann ger.

– Men tað er torført at fáa tað at sampakka við veruleikan, um samstundis verður tosað um demokratiska tilgongd, heldur hann.

Atli Dam sigur, at hann sjálvur ávaraði í móti hesum, longu tá fyrsta viðgerð av nýggju stýrisskipanarlógini var fyri á Løgtingi. Hann vísti tá á veikleikar, sum kundu vera í lógini, og ein teirra vísir seg nú at vera júst, sum hann tá sá fyri sær.

Hann sigur, at tann avtalan, sum gjørd er millum Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin, minkar munandi um samráðingarmøguleikarnar. Og tá so ein kombinatión við Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum eisini er útihýst, verður lítið eftir.

Atli Dam dylur ikki fyri, at hann er ósamdur við tí, sum løgmaður ger, og tekur fult undir við støðuni hjá Jóannesi Eidesgaard, formanni Javnaðarfloksins.

Andin í tí, sum hendir í føroyskum politikki í løtuni, førkar okkum burtur frá demokratinum, sigur Atli Dam, fyrrverandi løgmaður

Alveldi

Løgmaður í stólinum
man so fastur sita
eingin hevur kláráð enn
hann úr sæti flyta

Roynt tey hava megi alla
javnaður og miða
sambandið er komið til
at best tað er at tiga

Tykist sum í Afrika
støðan vera vorðin
hóast tú ei valið vinnur
út mást verða borin

Fólkaræði tosa vit
um á hvørjum degi
onkur heldur tó at hetta
mest er veldisgreði

Stýrisskipan sigur okkum
løgmaðurin ræður
sum tað nú sær út hann kann
sita allar ævir

edvard

Hetta er forkastiligt

Tað er uttan fyri alt mark, at tað skulu vera somu fólkini, sum verða rakt av verkfalli hvørja einastu ferð, ein arbeiðsósemja er í landinum. Tað líkist púra ongum, at eingin fiskur sleppur av Sandoynni, meðan alt annað kann flytast til oynna, sigur borgarstjórin í Skopun

VERKFALL
Edvard Joensen

Tað er forkastiligt, sum nú gongur fyri seg. Sandoyggin tolir hetta ikki nógvar dagar afturat. Øll framleiðslan hjá fiskavirkjunum liggur á goymslu og sleppur ikki av oynni, meðan alt annað kann flytast ímillum.

Skip sigla við øli og sovorðnum til oynna, men sleppa ikki at flyta fisk av oynni aftur. Tað líkist svartasta ongum, sigur Gerhard Lognberg, sum bæði er borgarstjóri í Skopun og løgtingsmaður.

Hann heldur, at nú mugu partarnir í trætuni koma saman aftur og fáa ein enda á verkfallinum, sum rakar heilt við síðuna av. Um teir fáa eina lønaravtalu ella ikki, má so koma í aðru røð, tí landið tolir hetta ikki. Skipini mugu fáast aftur at sigla. Tað er meira týdningarmikið enn alt annað í løtuni. Sjálvt samgongusamráðingarnar eiga at víkja fyri hesum, sigur Gerhard Lognberg.

– Tað verða ikki nógvir dagar aftur at við hesum lagnum, til fiskavirkini í oynni bukka undir, og tað verður ein vanlukka, sigur Gerhard Lognberg.

Eisini hava bøndurnir í Sandoynni trupulleikar við at fáa fóður til kríatúrini, og tað er ikki minni vanlukkuligt.

– Steðgar øll hendan vinnan upp um nakrar dagar, sum vandi er fyri, so er oyggin illa farin, sigur Gerhard Lognberg.

Tað er eingin ivi um, at tað er tað reina spott at bjóða skiparum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni hasa lønina, teir fáa. Tann sum er ósamdur við mær í tí, er ikki í ordan, sigur Gerhard Lognberg og vil harvið leggja dent á, at tað er landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, sum eftir hansara meting eigur høvuðsskuldina fyri støðuni, sum hon er í dag.

Tað hevur víst seg seinastu árini, at tað er Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum, sum er felagsnevnarin fyri flestu av teimum verkføllunum, sum seinnu árini regluliga hava verið, vísir hann á.

Gerhard Lognberg hevur kortini ikki hug til í óðum verkum at fara undir at seta í verk blokadur móti tí, sum til oynna kemur, tí tað rakar bara tey í halan, sum eru rakt frammanundan.

Hann vísir eisini á, hvussu út av lagi ring støðan er við ruskinum í Sandoynni. Har liggur jú alt eftir, eins og alla aðrastaðni, har verkfallið rakar.

– Eitt verkfall skal raka allastaðni, sigur Gerhard Lognberg, men soleiðis er tað ikki her. Á miðstaðarøkinum vita fólk ikki av hesum verkfallinum. Tey taka tað ikki upp á tungu, tí tey vita ikki, hvat eitt verkfall er fyri nakað, sigur borgarstjórin í Skopun.

Hann er ikki í iva um, at hetta er uppstaðið av berum kleyvarkapi, tí hetta átti at verið loyst longu áðrenn valið, um nakar vilji var til tess.



Ruskið rúgvar seg upp og kann gerast beinleiðis heilsuskaðiligt, tí ikki slepst burtur við tí, samstundis sum tað tykist alneyðugt at leiga skip at flyta øl í oynna, sigur borgarstjórin í Skopun um støðuna á Sandoynni